– trygt og ómakaleyst til hús

INNI



# Sera góð hús á Strondum

**Alt er gjørt á besta hátt – bæði innan og uttan. Húsini eru sera snøgg og nakað heilt serligt.**









## Fyrsta fatanin

Fyrsta fatanin er, at í hesi gøtuni standa eini hús, sum eru heilt serlig. Húsini standa væl fyri við blindan veg. Grannalagið er sera hugnaligt, og grannarnir eru blíðir og fyrikomandi.

## Húsini

Húsini eru í 2 hæddum. Tey eru 12 ára gomul, alt er innrættað, og húsini eru sera væl hildin. Húsini eru væl bjálvað, so orkunýtslan er lítil. Húsini eru nakað fyri seg og sera spennandi. Einki er spart, tá talan er um tilfar og dygd. Til húsini hoyrir eisini eitt stórt bilhús í tveimum hæddum og hjallur. Húsini hava stóran køk úr besta tilfari, úr køkinum er útgongd til altan. Brenniovnur er í stovuni, sum er stór og hugnalig. Tá tú kemur niður í niðaru hæddina, sært tú, at alt er innrættað og gjørt á besta hátt, og har er eitt stórt baðirúm við gosbaði. Úr niðaru hæddini er beinleiðis útgongd til urtagarðin. Húsini eru klødd við timbri og hava aluminiumstak.

Húsini standa sera væl og frítt fyri. Tað verður ikki bygt frammanfyri. Húsini standa í náttúruvøkrum, friðarligum, veðurgóðum og barnavinaligum umhvørvi við blindan veg og útsýnið er sera gott. Dagstovnur, bygdarhús, skúli, sparkivøllur og bussamband eru nær við.

## Stílur og snið – inni og úti

Stílurin er nútímans lættur og ljósur. Opni stílurin innan ger, at tú hevur gott samband við umhvørvið uttan, men hóast tað, er tað sera fjálgt inni hjá tær sjálvum. Sólargangur er góður, niðanfyri húsini er terassa. Alt økið uttan um húsini er gjørt liðugt og stórur og sera væl hildin garður / urtagarður er uttanum. Húsini standa í friðarligum, barnavinaligum umhvørvi og tætt er til allar hentleikar.

## Innan

Í ovari hæddini eru gongd, wc við brúsu, køkur, stova sjónvarpsstova, bryggers, hjúnarrúm, kamar , baðirúm, hjallur og hurð frá køkinum út á altanina. Í neðra er vaskikjallari / kjallari, gongd, fýrrum, 4 kømur og baðirúm við gosbaði.

## Fakta

**Adressa** ...........undir Torvbrekku 5, Strendur
**Byggiár:** ...........1998
**Hæddir:**............2
**Gólvvídd:**..........224 m²
**Grundøki:**.........720 m²
**Hjallur:** .............Ja
**Bilhús:**..............Ja
**Prísuppskot:** ...kr. 2.000.000









PF inni
Niels Finsensgøta 37
Postboks 364
FO-110 Tórshavn
Telefon 35 42 00
inni@inni.fo

Sí fleiri hús á **inni.fo**